Kommunufelagið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
19. oktober 2017

Okkara j.nr.
17/03234-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j. nr.

**Viðv.: uppskoti til løgtingslóg um bygging av barnaheimi í Tórshavn**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskot um løgtingslóg um at byggja barnaheim í Tórshavn.

Uppskotið er umvegis Barnaverndarstovuna sent øllum leiðslunum í barnaverndartænastunum til ummælis, og er uppskotið viðgjørt á felags fundi millum leiðararnar. Niðanfyri eru viðmerkingarnar frá leiðarunum:

Á fundinum tóku allir leiðararnir undir við uppskotinum um at byggja barnaheim í Tórshavn. Vit kundu tó ynskt okkum, at fosturforeldur, sum hava hava fosturbørn búgvandi, ið eru serliga krevjandi og ofta hava ymiskar diagnosur og ikki fáa nøktandi umlætting frá Almannaverkinum, fingu bjóðað umlætting á Barnaheiminum. Endamálið við umlættingin er at lætta um hjá fosturfamiljuni soleiðis, at fosturfamiljan kann fáa hvíld og at fosturfamiljan kann megna uppgávuna sum fosturforeldur og barnið kann búgva í eini vanligari familju so leingi tað er møguligt (hetta eiga barnaverndartænasturnar sjálvsagt ikki at gjalda fyri).

Barnarverndartænastan í Tórshavn hevði harumframt fylgjandi viðmerkingar:

**Málbólkur:**

1. Barnaverndartænastan vil gera vart við týdningin hjá barnakonum at hava møguleika fyri einum uppihaldið á barnaheiminum áðrenn barnsburð.
2. Ung, sum verða innskrivaði á barnaheimið, hava ofta nógvar samansettar trupulleikar - ein av hesum er rúsevnis/rúsdrekka trupulleikar. Barnaverndartænastan ynskir ikki, at hetta skal verða ein forðing fyri at hesi børn/ ung verða innskrivaði á barnaheiminum

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

**Familjur:**

1. Greitt verður frá, hvat hugtakið "familja" fevnir um. Barnaverndartænastan vil hervið vísa á týdningin av, at samveruforeldur eisini kunnu verða innskrivaði á barnaheiminum.

**Eftirvernd:**

1. Barnaverndartænastan vil vísa á, at tørvur eisini er á eftirvernd hjá børnum/ ungum, sum hava verið til fosturs. Barnaverndartænastan ynskir, at børn, sum hava verið til fostur fáa møguleika fyri eftirvernd á barnaheiminum eisini.
   Barnaverndartænastan vil vísa á, at langt frá øll børn og ung millum 18 og 23 ár, sum hava tørv á eftirvernd í vardum íbúðum, hava verið innskrivað á barnaheiminum. T.d. hava børn, sum hava verið til fosturs eisini tørv á eftirvernd í vardum íbúðum undir námsfrøðiligum uppsýni. Somuleiðis eru nógv ung millum 16- 23 ár, ið ikki hava verið umsorganaryvirtikin sambært § 19 í barnaverndarlógini til tey fylla 18 ár, men sum ístaðin hava verið stuðlað við fyribyrgjandi fyriskipanirnar, sambært § 15 í Barnaverndarlógini. Fleiri av hesum børnunum hava oftani stóran tørv á einum býli við skipaðum kørmum og uppsýni.

   Tørvurin verður sostatt ikki nøktaður, um so er, at tað bara er ung, sum hava verið innskrivað á viðgerðarstovni, sum fáa bjóðað íbúðir við námsfrøðiligum uppsýni.

**Aðrar viðmerkingar:**

1. Barnaverndartænastan vil vísa á tørvin á ungdómsíbúðum við námsfrøðiligum uppsýni. Tað eru børn og ung, sum ikki verða innskrivað á barnaheimi, men sum hava tørv á einum býli við skipaðum kørmum og uppsýni.
2. Rákið rundan um okkum í dag er, at barnaverndartænasturnar arbeiða meira miðvíst við netverkinum, soleiðis, at børn og ung í størri mun fara til fosturs hjá familju ella hjá eini netverksfamilju. Arbeitt verður við "mindsettinum" um, at børn og ung mennast betri í einum vanligum heimi enn á einum døgnstovni. Tí vil Barnaverndartænastan vísa á týdningin av at arbeiða meira miðvíst við professionellum fosturheimum.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Kommunufelagið

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Dennis Holm<br>Formaður | Eyðun Christiansen<br>Stjóri |

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo